# Dysturin í Vági fram-skund-aður

FSF boðar frá, at á seinasta leikdegi verður dysturin millum VB og EB/Streym spældur kl. 14.30 og ikki kl. 15.00, soleiðis sum tað annars varð fráboðað fyrr í vikuni.

Hetta verður gjørt, soleiðis at tað skal bera til hjá gestunum at sleppa norður um Suðuroyarfjørð sama kvøld, sum dysturin verður spældur.

Hetta brýtur annars við prinsippið um, at allir dystir skulu spælast samstundis á seinasta leikdegi, soleiðis at eingin partur kann gera sær dælt av at "spekulera" í longu kendum úrslitum.

**-mørk**

# Leik-bannið kann strikast

Kappingarnevndin hjá FSF fer leygarmorgunin at taka støðu til, hvørt Ovi Nysted kann spæla dyst leygardagin.

Ivamálið um hetta stendst av, at Ovi eftir dystarlok í Gundadali sunnudagin fekk reytt kort frá dómaranum. Kortið sjálvt stendur sjálvandi við, men tað er væl hugsandi, at leikbannið verður strikað, eftir at tað er komið fram, at dómarin sjálvur heldur seg kanska hava gjørt dekan ov nógv av.

Formaðurin í kappingarnevndini, Bjarki Mohr, hevur í vikuni verið burturstaddur, og tí hevur ikki verið gjørligt at samla nevndina í vikuni. Sjálvur sigur Bjarki, at hann ikki kann siga nakað her og nú um, hvørt leikbannið verður strikað ella ikki.

**- mørk**

KÍ-NSÍ:

# Niðurflytingin var ikki langt burturi

**KÍ venjarin, sum í dag biður farvæl, hevði ikki roknað við, at støðan var so vánalig, og NSÍ venjarin vil hava sínar menn at vera klárar at taka móti bronsumerkjunum**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Tá ið KÍ og NSÍ fara á vøllin í Klaksvík í dag, kenna báðir partar seg hava nógv at spæla fyri. NSÍ hevur framvegis møguleika at røkka bronsukrónunum, men so skal tað ganga framúr væl.

- Vit hava tvær ferðir fyrr í ár vunnið á KÍ - 3-2 í Klaksvík og 1-0 í Runavík - og vit hava framvegis nógv at spæla fyri. Tað hevði verið sera óheppið, um vit ikki vóru klárir at taka okkum av bronsukrónunum, um Skála ikki vinnur á GÍ, heldur Trygvi Mortensen, NSÍ venjarin, sum hevur allar spælararnar tøkar, og sum ikki ætlar sær at gera nýggjar royndir við NSÍ uppstillingini í Klaksvík. Tað heldur hann dystin vera ov týdningarmiklan til.

Oddbjørn Joensen fer fyri seinastu ferð at hava ábyrgdina av KÍ liðnum. Ábyrgdina fekk hann, eftir at KÍ móti NSÍ í Klaksvík 1. mai hevði verið á odda 2-0 og kortini tapti 3-2. Tað var eftir ta uppgerðina, at Ove Flindt Bjerg varð uppsagdur.



*Tað er greitt, at Oddbjørn Joensen ikki skal venja KÍ næsta ár. Kennir tú ikki tað sum misálitisváttan?*

- Eg havi valt at fokusera upp á uppgávuna, sum eg fekk. Hon var at hava ábyrgdina av KÍ í ár. Liðið var illa fyri, tá ið eg kom norður, og tað gjørdist uppaftur verri, tá ið Eyðun Klakstein og Erling Fles í summar vórðu langtíðarskaddir. Tá var møguleikin fyri niðurflyting ikki langt burtur. Vit royndu onkrar ungar og evnaríkar spælarar, men uppgávan var ov stór hjá so ungum monnum. Tíbetur fingu vit onkrar veteranar at hjálpa til, og saman við onkrum øðrum yngri monnum, sum aftur vórðu tøkir, hevur tað eydnast at hildið liðnum í deildini. Hvat spælinum viðvíkur, so hava vit móti øllum teimum fýra ovastu víst góð avrik, men tíverri hava úrslitini oftast koppað skeiva vegin. Nú hava vit síðsta møguleikan, og eg kenni á spælarunum, at teir eru uppsettir, sigur Oddbjørn Joensen.

*Men ert tú vónbrotin av ikki at hava fingið møguleikan at halda fram?*

- Eg havi valt at taka hetta, sum tað er komið. KÍ er felagið, sum eg eri uppvaksin í, og felagið fer altíð at standa mær nær, og eg ynski teimum alt tað besta. Tá ið KÍ í summar samráddist við nýggja venjaran órógvaði tað, og eg spurdi meg sjálvan, um eg skuldi taka meg aftur ella halda fram. Eg fekk holla ráðgeving, og nú eri eg fegin um, at eg helt fram, sigur Oddbjørn Joensen.

Í Klaksvík eru allir spælararnir væntandi tøkir. Einasta ivamálið er Ovi Nysted, sum fekk reytt kort móti HB seinast. Sum tað framgongur aðrastaðni á síðuni, so er tó møguleiki fyri, at leikbannið verður strikað.

Inntil fyri stuttum var møguleiki fyri, at KÍ skuldi flyta niður í dag. Síðsta umfarið í 1988 hevur kenst sum marra hjá klaksvíkingum, ið hava stúrt fyri endurtøku av tí dramanum. Ta ferðina hevði KÍ flutt niður, um NSÍ hevði fingið stig. KÍ vann 2-1, og NSÍ flutti niður. Men tað var tætt við, at heimaliðið reyk, og hjá summum KÍ viðhaldsfólkum fer tað framvegis kalt niður eftir rygginum, tá ið tey hugsa um NSÍ stútaran á tvørtræið dygst undan leikloki!

VB-EB/Streymur:

# Eingin avspákan hjá gestunum

**Hóast talan undir øllum umstøðum verður um fimta pláss, so siga gestirnir seg ikki vilja lata nakað fyri einki**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Hjá vágbingum er setningurin greiður undan seinasta dystinum á árinum. Hóast sigurin á Sevmýri fyri viku síðani, er enn ikki leyst og liðugt í botninum.

Tí eru trý stig tað einasta, sum spælararnir hugsa um, og fyri aðru ferð á rað tykist liðið vera so sterkt, sum tað á nakran hátt ber til. Roknað verður við, at allir teir, sum vóru á Sevmýri, eisini eru tøkir hesaferð, og so er spurningurin, um setningurin eisini verður rokkin hesaferð.




*Niðurtúrurin hjá VB tóktist av álvara at byrja, tá teir tíðliga í august mánaði vórðu avbukaðir á Eiði*

Sjálvir siga vágbingarnir seg ikki ivast. Dysturin skal vinnast, og so er tað líka mikið, hvussu leikur fer aðra staðni kring landið. Og sum so kann seinasta uppgerðin kanska eisini tæna sum ein eyka motivatión hjá liðnum. Í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin fekk VB nevnliga av at vita á Eiði.

Á pappírinum er uppgávan kanska yvirkomulig, nú EB/Streymur ikki hevur stórt meira at spæla fyri í ár. Men fyri tað siga teir á felagsliðnum, at teir vilja enda árið væl og virðiliga.

Í mun til vanligu manningina, verður tað tó eitt nakað skert EB/Streymur, sum fer á vøllin til seinastu uppgávuna á árinum. Sorin Anghel er leikbannaður, og hann fær tí ikki tikið seinasta umfarið av kappingini um gylta skógvin við. Hartil verður Egil á Bø heldur ikki partur av ferðalagnum. Ikki tí at honum bilar nakað, men barnsburður standur fyri framman, og so verður tað mett heldur vágið at fara til Vágs at spæla fótbólt.

Tað telur tó rætta vegin, at Fróði Clementsen aftur er tøkur eftir skaða, og so er spurningurin bara, hvussu Piotr Krakowski blandar kortini undan seinasta dystinum í ár.